## DAGSINS MEINING

# Tíggju ár við Gøran

Svøríki er eitt av heimsins bestu londum at liva í og eingin ivi man vera um, at svensku sosialdemorkatarnir hava heiðurin av hesum, Tað var Erlander, sáli, sum fann uppá heiti ”fólkaheim” um svenska vælferðarsamfelagið. Erlander var forsætirmálaráðharri í eitt mannaminni. Hugtakið “fólkaheim” var nógv gjørt til gjøldur ikki minst í Føroyum, tá ið føroyski Javnaðarflokkurin tók tað til sín, og nú hoyrist hetta orð at kalla ikki longur. Men hugsjónin, at Norðurlond skulu gerast heimins bestu lond at liva í, er framvegis eins aktuell sum fyri hálvari øld síðan.

Tað eru nú 10 ár síðani, at Gøran Persson tók sum forsætisráðharri. Hann hevur gingið sínar egnu leiðir í so mongum. Tá ið heitt varð á hann á sinni um at gerast forsætisráðharri bar hann seg undan. Hansara áhugi var búskapur, menning og vælferð og vildi hann heldur arbeiða meira fakliga enn politiskt. Men hann tók við og vísti seg at hava framúr góðar politiskar gávur. Hann helt, mótsett, sínum donsku og norsku starvsbrøðrum, rimmar, ja, næstan fanatiskt fast um vælferðarsamfelagið. Hann helt fast, tá ið aðrir við Blair á odda fóru at glíða í spurninginum um vælferðarsamfelagið. Gøran var og er sannførdur um, at hetta er ikki bara tað besta fyri Svøríki, men eisini tann besti háttur a varðveita valdið.

Nú hevur Gøran sitið í forsætisráðharrasessinum í tíggju ár, og tað eru tey uttan sum innanflokks, ið halda, at tíð er til at skifta formann og forsætisráðharra. Men Gøran Persson er ósamdur. Hann hevur ongar ætlanir um at fara frá, og er hetta uttan iva gott fyri flokk og land. Hann fær harða mótstøðu til valið komandi. Fyri fyrstu ferð stendur hann frammanfyri einari samlaðari andstøðu. Fyri fyrstu ferð fer andstøðan til valstríð sum ein bólkur. Tað er ein nýggj støða, sum svenski javnaðarflokkurin ikki er vanur við, og tí er valið komandi eitt sera spennandi val. Gøran vitjaði í Føroyum herfyri og verður tann vitjanin vónandi við til at menna samstarvið millum bæði londini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Nú klóra teir eftir ØLLUM!!!



RANDI Í JÓGVANSTOVU

Og teir kenni eingi mørk. Tá ALS kom í gildið í 1992, var tað 25 ár síðani at nakað uppskot um arbeiðsloysistrygging seinast var á tingi. Tað kom tá ígjøgnum við eymk og fret, fyri at siga tað sum tað var, og tað var í tøkum tíma.

Verkafólk og arbeiðsgevarar, hava goldið inn í hesa skipan øll hesi árini.

Tey hava bygt upp frá botninum av, eina skipan sum er vorðin betur við tíðini, tó at eitt og annað helst kundi verið betur, gongur fram á.

MEN nú kenna landsins myndugleikar enn einaferð trongd á sær, at fáa fatur á teimum stakkals krónunum, ið eru at finna í hasum grunninum. Tað eru ikki so nógv ár síðani seinast, (uml. 4 ár) síðani teir royndu, at seta klørnar í ALS skipanina, tá eydnaðist tað so ikki.

Endar ALS inni á fíggjarætlanini hjá landinum, eigur skipanin onga framtíð, og fer hon tá fyri skeyti, skjótari enn vit klára at blunka.

# Mótmæli

GUNNAR SKÚVADAL
pápi Sáru, 7 ár og Anniku, 3 ár

Eg vil hervið vegna míni egnu, og uttan iva eisini nógv onnur børn í Føroyum, mótmæla, at Sjónvarpið tekur barnasendingina sunnumorgun av skránni ella útsetur hana til frama fyri koyring við rasarabilum ella onkra aðra líknandi sending.

Ein tann fornemmasta uppgávan hjá føroyskum sjónvarpi má vera at senda tilfar til føroysk børn, tí tað ger ongin onnur sjónvarpsstøð í heiminum. Tey sum hava áhuga í Formel 1 koyring o.l hava næstan óavmarkaðar møguleikar at skaffa sær hetta tilfarið.

Tá sjónvarpið nú hevur vant føroysk børn við, at tey eiga løtuna kl 8 sunnumorgun, so má tað vera so, at rættuliga nógv skal til áðrenn tað verður broytt.

# Vónandi eingin <u>føsil</u> á føðideildini!?!



EYÐUN Á BORG

**Málfløkja**
Hvat er ein føsil? Móðurmálsorðabókin sigur: FØSIL er ein fløkja, okkurt samanfløkt (lína, snøri, tógv, hár o.s.fr.).

Vit eru tíbetur næstan sloppin av við føsilsdag ella følsdag. Føðingardagur man vera tað vanliga nú, so á summum økjum gongur framá!

Orðið føðing verður kanska ikki brúkt so ofta. Vanligt er enn at hoyra bæði mammur, starvsfólk og onnur tosa um føslar, tá talan er um at eiga (barn). Spell!

Ein føðing er ein sera stór, vøkur, lívsjáttandi og hugtakandi hending, eisini hjá áskoðaranum! Latið okkum øll nú royna at siga føðing og ikki føsil (fløkja)!

Góða føðing, allar barnakonur!

Við vón um nógvar føsilsleysar føðingar!

Við føðingarkvøðu


Illur???

Sig tína meining í Sosialinum





**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.